# Lívdin er eisini fyri tey vaksnu

*Nývalda nevndin í felagnum Lívdini í Havn fer nú til verka*

Týskvøldið hevði felagið Lívdin í Havn aðalfund. Umleið 20 fólk vóru á fundinum.

Fýra nevndarlimir tók ikki við afturvali, og nýtt fólk varð valt í teirra stað. Einastu nevndarlimirnir, sum halda fram, eru Jákup Joensen og Ronald Poulsen, sum umboðar býráðið í nevndini. Hinir nevndarlimirnir eru Barbara Tinad, Arnbjørn Thomsen, René Láadal og Jónfinn Vestergaard. Jónfiinn Vestergaard hevur áður verið formaður, men hevur verið burtur úr nevndini seinasta árið.

Nýggja nevndin ætlaði at skipa seg í gjárkvøldið.

Stórar uppgávur hevur nýggja nevndin at fara í holtur við.

Ein teirra er at finna felagnum nýggj høli. Lívdin heldur til í hølum hjá býráðnum Djóna í Geilsgøtu, men har er ikki inniverandi longur.

Tað var gott, tá felagið flutti inn í vár, men stutt eftir fekk musikkskúlin høli í neðra, og fyri stuttum varð ein hæddin tikin í nýtslu til jazztónleik. Úrslitið er, at tað ikki hoyrist mnannamal inni í Lívdini.

Tað er helst orsøkin til, at tey tilkomnu fólkini hava hildið seg burtur frá Lívdini, heldur Jónfinn Vestergaard. Tet tilkomnu rýmdu undan ganginum. Seinastu tíðina eru har mest komin børn, niður í fimm ára aldur. Tað var ongantíð ætlanin. Lívdin skuldi verða fyri vaksin fólk, og tí fara tey nú helst at seta 14 ár sum aldursmark niðureftir.

Ein onnur uppgáva verður at fáa fleiri fólk at gera tað sjálvbodna arbeiðið í felagnum.

Lívdin skal verða eitt stað, har fólk, sum ikki eru ávirkað av nøkrum rúsevni, koma saman at lesa bløð, spæla ymisk spøl, hugna sær og práta. Har er sjónvarp, og kaffi, køkur og góðgæti fæst til keyps.

**randi**



**Jónfinn Vestergaard var millum teirra, sum stovnaðu Lívdina. Nú er hann aftur komin í nevndina**

# Barnabati er knottin

*Nú eru fleiri føroyskir jólakalendarar*

Fyri nøkrum árum síðan var bara ein føroyskur jólakalendari, og tað var tann hjá Barnabata. Men nú eru fleiri, og tað dámar Barnabata lítið.

Barnabati er serliga knottin inn á útvarpið, sum í ár er komið við sínum egna jólakalendara. Barnabati heldur ikki, at tað sømir seg einum almennum stovni at kappast við eitt felag, sum letur vinningin av søluni til vælgerandi endamál. Barnabati heldur, at útvarpið heldur átti at nýtt teirra í sínum morgunsendingum fyri børnum. Tað gjørdi barnaútvarpið fyri nøkrum árum síðan.

Men tað hevur sína frágreiðing. Tá Barnabati fekk Barnaløtuna í sjónvarpinum at nýta kalendaran, valdi útvarpið eina aðra loysn, og hon var at nýta jólakalendaran hjá ítróttarfelagnum Mjølnir. Tað samstarvið gekk væl, men í fjør hevði Mjølnir ongan jólakalendara við tí úrsliti, at barnaútvarpið stóð á berum við ongum jólakalendara. Hetta mátti ikki henda aftur, helt útvarpið og avgjørdi tí at geva sín egna jólakalendara út.

- Ætlan okkara er ikki at kappast við nakran. Vit vilja bara gera eina hugnaliga løtu fyri børnunum, sigur Høgni Joensen í barnaútvarpinum. Jólakalendari teirra verður heldur ikki givin út við vinningin fyri eyga. Hann skal bara bera seg. Men verður nakar vinningur, verða pengarnir latnir onkrum tiltaki, ið gagnar børnum, sigur Høgni Joensen. Tað kundi hóskandi verið Barnabati, heldur Barnabati.

Jólakalendarin hjá Barnabata kemur helst meira víða enn tann hjá útvarpinum, tí skótar ganga hús úr húsi fyri Barnabata.

Skótarnir fáa helvtina av vinninginum, jólakalendarin hjá Barnabata gevur. Hin helvtin fer til eitt tól at kanna børn við gulsótt við á Landssjúkrahúsinum og til eitt heim fyri foreldraleys børn í Rumenia.

**randi**



**FLEIRI GLIÐU.** *Kring alt landið hava fleiri ferðsluóhapp verið í hálkuni seinastu dagarnar, men vit hava ikki frætt um nakað álvarsligt ferðsluóhapp. Seinnapartin týsdagin hendu fleiri m.a. í Havn, og gjáramorgunin vóru nakrir bilar farnir út av Oyggjarvegnum. Løgreglan í Havn hevði ikki fingið fráboðan um nakran av bilinum, sum farnir vóru út av á oynni. Er bara ein bilur í óhappinum, ikki rúsdrekkakoyring, og einki ivamál er um skyld, hevur løgreglan eisini lítið at gera við málið. Loysir tað seg fyri bileigaran, boðar hann sjálvur tryggingin frá skaðanum*

# Funnu onki

Beint fyri klokkan fimm seinnapartin týsdagin fekk løgreglan boð um, at fólk á Velbastað høvdu sæð fýra rakettir úti móti Koltri. Ein av teimum var reyð sum neyðrakettirnar.

Vaktar & Bjargingartænastan fekk beinanvegin boðini og farið varð at leita. Leitingin helt fram til hálvgum tíggju um kvøldið, men har var einki at finna.

**HØLI Á ARGJUM**

uml. 62 fermetrar til støddar við inngongd av Argjavegnum — til leigu frá 1. jan. 1991.

Hølini eru væl hóskandi til skrivstovu, handil, goymslu ella annað vinnuligt endamál.

**Tlf. 11820**